


ÚTLÁT

*Jóhanna Olsen, deildarleiðari, Maria Gunnleivsdóttir Hansen, umhvørvisviðgeri og Jákup Pauli Joensen, stjóri á Umhvørvisstovuni løgdu hagtølini fram*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Minni vakstrarhúsgass orsakað av kreppu

**Útlátið av vakstrarhúsgassi í Føroyum er minkað tvey tey seinastu árini. Høvuðsorsøkin er, at skipini eru færri, og tey hava fiskað minni**

Randi Jacobsen

Umhvørvisstovan legði í gjár nýggjastu tølini fram yvir útlátið av vakstarhúsgassi, og tølini vísa, at oljunýtslan er minkað.

Tølini verða gjørd upp í brúkarabólkar, og londini brúka felags reglur ri at sleppa undan, at nakað verður talt við tvær ferðir.

Serliga er oljunýtslan hjá skipunum minkað, og tað kemur fyrst og fremst av, at skip eru farin úr flotanum, og skipini hava ikki fiskað so nógv sum árini frammanundan. Reiðaríini hava eisini gjørt tað, tey eru ment, at spara olju, nú oljurpísurin hevur verið so høgur.

## Húsarhaldini gera sítt

Húsarhaldini hava somuleiðis brúkt nakað minni.

- Hetta kundi hugsast at komið av hugburðsbroyting, men vit hava sæð, at seinastu tvey árini hava umleið 600 hús fingið sær hitapumpu. Haraftrat hevur tað verið nógv líggjari, sigur Jóhanna Olsen, deildarleiðari á Umhvørvisstovuni.

Akførini hava somuleiðis brúkt eitt sindur minni, og ein orsøk er, at minni er brúkt av diesel.

- Tað er gleðiligt, at nýtslan og harvið útlátið minkar, men vit kunnu ikki siga, at tað kemur av tiltøkum, sigur Jóhanna Olsen.

Roknað er út frá nýtsluni í 1990, og tølini vísa, at føroyska útlátið nú er minni enn í 1990.

## Fokus á umhvørvið

Annars sigur veðurpolitikkurin, sum løgtingið samtykti, at útlátið í 2020 skal verða 20 prosent minn enn í 250.

- Útlátið er longu minkað 12 prosent síðan 2005, og tað ljóðar væl. Men ikki ber til at siga, um henda gongin fer at halda fram, sigur Jóhann Olsen.

Hon fegnast um, at so nógv fokus er sett seinastu árini á orkunýtsluna, og serliga eru tað privatu brúkararnir, sum eru tilvitandi. Heilt nógv fólk hava gjørt íløgur í bjálvigin og hitapumpur.

Undir framløguni varð eisini nevnt, at ein kunngerð, sum heimilar Umhvørvisstovuni atheita á oljufeløgini um at útflýggja upplýsingar, ið siga, hvussu nógva olju hvørt einstakt skip hevur fingið av olju. Upp á tann mátan fer at bera betur til at fylgja við, hvør brúkar mest.

randi@sosialurin.fo

# KÍ mist nógv

**Tað kostar Klaksvíkar Ítróttarfelag nógv, at fyritøkan Injektor Trawldoors hjá Jan Allan Müller er farin av knóranum**

Randi Jacobsen

Ein long røð av kreditorum hava mist størri og minni upphæddir fyri arbeiði, fyritøkurnar hava gjørt fyri Injektor Trawldoors, sum er farið á húsagang.

Klaksvíkar Ítróttarfelag er ein kreditorur, og teirra missur er sponsorpeningur fyri í hvussu er eitt ár.

Fyri góðum tveimum árum síðan gjørdi KÍ sáttmála við Injektor Trawldoors um at sponsorera, og tá fekk fótbóltsvøllurin í Klaksvík navnið Injektor Arena.

Men illa hevur alla tíðina gingið hjá KÍ at fáa peningin frá Injektor Trawldoors, og tá ið Injektor Trawldoors endaði í fútarættinum í summar, gavst KÍ at rykkja eftir peninginum. Frægast var at gevast vi stríðnum fyri at brúka peningin til annað, helt nevndin.




*Tað var eingin góður handil fyri KÍ at gera sattmála við Injektor Arena. Vøllurin hevur fingið sítt gamla navn aftur*

Sáttmálin segði, at KÍ skuldi hava 120.000 krónur um árið. Í ár hevur felagið ikki fingið eitt oyra, so kravið til trotabúgvið er minst tað.

Vøllurin ber nú aftur navnið vøllurin á Djúpumýri. Injektorskeltið er tó ikki tikið niður enn. Tað hevur ongan skund at taka tað niður, nú eingin fótbóltur er kortini.

KÍ væntar ikki, tað verður trupult at finna nýggjan sponsor, nú felagið aftur er í fremstu deild. Fíggjarliga er felagið eisini komið upp undan aftur.

# Sandoyggin ein kommuna

Randi Jacobsen

Alt bendir nú á, at Sandoyggin eftir næsta kommunuval verður ein kommuna.

Kommunustýrið á Sandi viðgjørdi á fundi í mánakvøldið spurningin, og semja var um at leggja saman. Eisini varð samtykt, at í næstum skal haldast vegleiðandi fólkaatkvøða í Sands kommunu.

- Hetta kemur fyrst og fremst av, at fíggjarvánirnar eru, sum tær eru, sigur Brandur Sandoy, borgarstjóri á Sandi.

Í fjør kallaði Gerhard Lognberg, borgarstjóri í Skopun allar borgarstjórarnar í oynni á fund at umrøða málið. Tá hendi ikki meira, men fyri einum lítlum mánaði síðan tók Brandur Sandoy aftur stig til at hava borgarstjórafund.

Tá var samtykt, at borgarstjórarnir skuldu fara til síni kommunustýri og spyrja, hvørja støðu tey høvdu til samanlegging og at hava vegleiðandi fólkaatkvøðu.

- Eg vóni, at samanlegging verður veruleiki, sigur Brandur Sandoy.